Fiskiveiðieftirlitið:

# Viknar við dýrari olju



- Eg haldi, tað vera skeivt, at okkara eftirlit yvirhøvur skal vera tengt at oljuprísunum, sigur Bjørn Kalsø, landsst‡rismaður
Mynd: Vilmund Jacobsen

**- Tað kann ikki vera rætt, at eftirlitistúrarnir hjá Brimli og Tjaldrinum skulu fækka, so hvørt sum oljan dýrkar, heldur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

**FISKIVEIÐIEFTIRLIT**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein partur av samlaðu útreiðslunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum er olja, sum vaktarskipini, Brimil og Tjaldrið, brenna, meðan tey útinna sínar eftirlitsuppgávur og hjálparuppgávur á havinum.

Men oljan er dýr, og hetta sæst eisini aftur á útreiðslusíðuni hjá eftirlitinum.

Eitt dømi um, hvussu dýr oljan í veruleikanum er, er leitingartúrurin hjá Christiani í Grótinum og Norðborg herfyri, sum Kristian Martin Rasmussen og synir varða av.

Í samrøðu við Sosialin segði reiðarin, at skipini leitaðu eftir svartkjafti í eina viku, og bara hesa vikuna brendu tey olju fyri heilar 5 miljónir krónur!

Fiskiveiðieftirlitið hevur eina játtan, og tá ið henda játtan hevur sítt "loft", merkir tað, at ráð eru til minni sigling við dýrari olju.

- Eg haldi ikki, at vit sum fiskivinnutjóð kunnu liva við hesum, sigur landsstýrismaðurin, Bjørn Kalsø, sum fleiri ferðir hevur gjørt vart við hetta.

Hann heldur ikki, at dygdin í fiskiveiðieftirlitinum eigur at hanga saman við, hvørt oljan er dýrari ella bíligari.

## Norðmenn raskari

Norskir línubátar, sum í hesum døgum liggja á Havnini og bíða eftir sínámillum fiskiveiðiavtaluni millum Føroyar og Noreg, kunnu á sama túri bæði veiða í føroyskum sjógvi og í ES-sjógvi. Hetta setir stór krøv til okkara fiskiveiðieftirlit.

Bjørn Kalsø vísir á, at føroyskir myndugleikar sambært sáttmálanum kunnu krevja av norsku línubátunum, at teir møta á einari ávísari leið til kanningar, tá ið teir koma í føroyskt øki.

– Biðja vit um hetta, kunnu skipini ikki nokta, sigur hann.

Landsstýrismaðurin heldur tó, at fáar tjóðir hava eitt so virkið fiskiveiðieftirlit sum norðmenn, og hann kundi hugsað sær, at okkara eftirlit í ávísum førum var uppaftur betur.

– Í øllum førum haldi eg tað vera skeivt, at okkara eftirlit yvirhøvur skal vera tengt at oljuprísunum, sigur Bjørn Kalsø.

Føroysku flakatrolararnir eystanfyri hava eisini loyvi at royna bæði í norskum sjógvi, russiskum sjógvi og í Svalbards-økinum á sama túri.

- Men eg haldi, at norsku myndugleikarnir eru dúgligari at fremja eftirlit, enn vit eru, sigur landsst‡rismaðurin.

STARVSLÝSING

## Starvsfólkaleiðari

**Orsakað av at stovnurin ynskir fleiri skikkaðar umsøkjarar at velja ímillum til hetta starvið, søkja vit av nýggjum eftir starvsfólkaleiðara.
Av tí at verandi starvsfólkaleiðari ynskir at fara í annað starv á Landsverki verður við hesum søkt eftir nýggjum starvsfólkaleiðara at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt avbjóðandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávan er at leiða og standa fyri starvsfólkadeildini. Starvsfólkadeildin tekur sær av bæði starvsfólkarøkt og umsiting, herundir øllum tí, sum hevur við setanarviðurskifti at gera, menning av starvsfólki, skrivstovuumsiting, frítíð, arbeiðstíð og lønarviðurskiftum. Í hesum sambandi er tað eisini ein uppgáva at gera yvirskipaðar mannagongdir og reglur.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir fólki við viðkomandi hægri útbúgving ella líknandi og helst við royndum innan leiðslu.

Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er førur fyri at eggja og ganga undan, er miðvísur, arbeiðir strukturerað og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk
Postboks 78,
110 Tórshavn

og skal vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 10. januar 2005. Merkið brævbjálvan "Starvsfólkaleiðari". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes, stjóra, á tel. 311 333 ella á ob@lv.fo

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo
LANDSVERK byggir land

STARVSLÝSING

## Starvsfólk til havnadeildina

**Søkt verður hervið eftir fólki til havnadeildina at taka sær av eftirliti, viðlíkahaldi og innsavning av dátum í sambandi við vind-, aldu- og streymmátingar. Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum, hydrografiskum og meteorologiskum mátingum og øðrum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum skal røkja, fevna eitt nú um:
- Uppseting og viðlíkahald av veðurstøðum
- Útlegging og viðlíkahald av streym- og aldumátarum
- Góðskutryggja tær dátur, sum verða innsamlaðar
- Fyrireika veðurdátur til heimasíðuna.
- Skráseta dátur í dátagrunni Landsverks umframt aðrar fyrifallandi uppgávur

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir fólki við útbúgving innan kt-økið, og sum hevur tekniskan førleika og áhuga fyri at menna verandi skipanir. Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni, skal duga at skipa sítt arbeiðsøki og geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum, umframt vera førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt. Neyðugt er eisini, at umsøkjarin hevur vanligt koyrikort.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til:
Landsverk,
Postsmoga 78,
FO 110 Tórshavn,

og skulu verða skrivstovuni her í hendi í seinasta lagi 16. januar 2006. Merkið brævbjálvan "Starvsfólk til havnadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ewald Kjølbro, deildarleiðara, á tel. 311 333 lokal 316 ella fartel. 540 861.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo
LANDSVERK byggir land